Fylgiskjal 2

LM-029/2022

Nella Festirstein

Fra:	Astrid Reinert Øregaard
Sendt:	9. september 2022 15:56
Til:	Nella Festirstein
Cc:	Pól Edvard Egholm; Herálvur Joensen; Eyðfinnur Jacobsen; 'Magni á Deild Olsen'; Mai-Britt Vinther
Emne:	SV: TIL UMMÆLIS. Freist 12. september. Uppskot til løgtingslóg um fylgibroytingar í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni (Avtøka av kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvingsilsnevndini)

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um fylgibroytingar i sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni (Avtøka av kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvingsilsnevndini).

Viðmerking til § 1 í lógaruppskotinum:
Umhvørvis- og vinnumaálaráðið arbeiðir í løtuni saman við Arbeiðsloysisskipanini við at gera broytingar í ALS-lógini, sum ætlandi skulu fáa gildi 1. januar 2023. Av tí, at Løgmansskrivstovan ger fylgilógarbroytingarnar í sambandi við umskipanina av Føroya Kærustovni, so at broytingarnar verða gjørdar eftir sama leisti, ger Umhvørvis- og vinnumálaráðið onga broyting í § 26 í ALS-lógini, men letur tað verða gjørt í lógaruppskotinum hjá Løgmansskrivstovuni.

Í § 26, stk. 1, 3. pkt. í ALS-lógini stendur, at freistin hjá *Arbeiðsloysisskipanini* at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er innan 6 mánaðir eru farnir frá, at *Arbeiðsloysisskipanin* er kunnað um avgerðina. Ongin freist er hjá borgaranum. Í løgtingslógini um Føroya Kærustovn § 15 verður ikki skilt í millum borgara og stovn/myndugleika, men avgerðir hjá Føroya Kærustovni kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað *viðkomandi*. Umhvørvis- og vinnumálaráðið og stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina halda, at tað eigur at verða gjørt greitt í ALS-lógini, at 6 mánaðar freistin er galdandi bæði fyri Arbeiðsloysisskipanina og fyri borgaran.

§ 1, nr. 2
Mælt verður til, at § 26, stk. 1, 2. pkt. í ALS-lógini verður orðað soleiðis: "Avgerðir hjá Føroya Kærustovni kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.", og at 3. pkt. verður strikað.

§ 1, nr. 3 og 4
Mælt verður til at strika § 26, stk. 2.

Viðmerkingar til § 2 í lógaruppskotinum:
Í § 25 a, stk. 1, 3. pkt. í barsilslógini stendur, at freistin hjá *landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum sbrt. § 25* at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir, frá at *landsstýrismaðurin ella umsitingarmyndugleikin* er kunnaður um avgerðina. Ongin freist er hjá borgaranum. Í løgtingslógini um Føroya Kærustovn § 15 verður ikki skilt í millum borgara og stovn/myndugleika, men avgerðir hjá Føroya Kærustovni kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað *viðkomandi*. Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur, at tað eigur at verða gjørt greitt í barsilslógini, at 6 mánaðar freistin er galdandi bæði fyri landsstýrismannin/Barsilsskipanina og fyri borgaran.

§ 2, nr. 2
Mælt verður til, at § 25 a, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Avgerðir hjá Føroya Kærustovni kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.", og at 3. pkt. verður strikað.

§ 2, nr. 3 og 4
Mælt verður til at strika § 25 a, stk. 2.